# Kjak



Levi Mørk
*býráðslimur hjá Tórshavnar kommunu*

## Eftirskúlin í Hvalba – stóran týdning fyri okkara samfelag!

Eg eri vitandi um, at teir umleið 260 eftirskúlarnir í Danmark hava 70 prosent av øllum teimun donsku 10. floksnæmingunum. Ein má so staðfesta, at eftirskúlin er komin fyri at vera í Danmark, hóast danska stjórnin minkaði stuðilin til eftirskúlarnar í 90-unum. Nú álit um eftirskúlar er gjørt, eri eg eisini samførdur um, at Hvalba er tað rættað plássið at byggja nýggjan eftirskúla, tí har er vøkur náttura, nógv vinnulív, ítróttarmøguleikar og nógv annað, sum ger meg samførdan um, at hetta er tað rættað.

**Hví fara á eftirskúla**

Fleiri kanningar rundan um okkum vísa til, hví foreldrini lata síni ung fara á eftirskúla, og tað framgongur av foreldrunum, at orsøkirnar eru fleiri. Tað er serliga í Jútlandi at tað er "inn" at ganga á eftirskúla. Tað er ein partur av danskari siðvenju at fara á eftirskúla, serliga í Jútlandi er áhugin stórur, og teir eftirskúlar, sum liggja eitt nú í Keypmannahavn, hava nógvar næmingar, sum koma frá Jútlandi og Fjóni, meðan tað ikki eru so nógv ung, sum koma úr Keypmannahavn til Jútlands á eftirskúla, hóast talið er høgt.

**Hvat siga foreldrini**

Foreldrini vilja fegin at teirra næmingur fara á eftirskúla, tí tey hava kanska sjálvi gingið á eftirskúla, og tey kenna eftirskúlan sum sín egna buksilumma, tað er ein tryggur, skipaður og læruríkur skúli, og tey ungu mennast bæði fakliga og sosialt. Ikki at gloyma, at tey vera sjálvi betri fyri at gerast sjálvbjargin og harvið eru betri før fyri at taka skilagóðar avgerðir í framtíðini.

**Eftirskúlin styrkir sjálvsálitið**

Fleiri kanningar vísa eisini á, at tey ungu, sum hava gingið á eftirskúla, eru eisini betri fyri, tá ið tey koma inn á miðnámsskúlarnar, og tey eru meira sjálvbjargin og hava størri sjálvsálit, og tað er eisini við til at styrkja teirra fakliga og sosiala kunnleika, tá ið tey fara víðar í teirra lívi.

**Tað sosiala er altavgerandi**

Tað sosiala lívið á einum eftirskúla er eftir mínum tykki tann mest týdningarmikli parturin við eftirskúla- hugsanini, og hetta sæst eisini aftur í álitinum um eftirskúlar, har serligur dentur verður lagdur á kostdeild og sosialar førleikar.

**Læra av okkara ringastu krepputíð og fyribyrgja**

Vit mugu ikki gloyma krepputíðina seinast í 80 –unum og 90- unum, tá ið eisini okkara ungdómur fór í hópatali til Danmarkar og aðrastaðni undan kreppuni. Nógv ung fóru á Genner og Hygum í áttatiárunum og nítiunum á eftirskúla. Vit hava aftur nú eina búskaparkreppu, men munurin er, at hon er allastaðni í heiminum og ikki sum í 90-unum, tá ið okkara oyggjaland var sera hart rakt.

Trupulleikin í 90-unum var, at størsti parturin av okkara ungdómi ikki kom heim aftur til móðurlandið, men fór beina kós í danskar eftirskúlar og studentaskúlar o.a. Men her skal eisini nevnast, at búskaparstøða Føroya í 90- unum gjørdi sítt til, at vit mistu ein stóran part av okkara unga ættarliði.

**Vit mugu fyribyrgja og hava visónir, hóast stórt hall á fíggjarlógini**

Hóast stórt hall á fíggjarlógini og búskaparkreppan stendur við, meti eg, at best er at byggja nýggjan eftirskúla í Hvalba í stundini og ikki nakra aðrar fyribilsloysnir sum røddir eru frammi við. Hasar 40 til 50 milliónir krónur er ein íløga langt inn í framtíðina og eg meti eisini at tað skal setast nógv meira pengar av til endamálið á fíggjarlógini fyri næsta ár. Nei, vit mugu byggja nýggjan eftirskúla í Hvalba beinanvegin og harvið fyribyrja, at okkara núverandi ættarlið ikki rýmir av landinum. Tá er einki vunnið. Vit skulu heldur ikki gloyma, at um vit ikki styrkja øll økir av landinum, serliga innan skúlagott, standa vit ikki sterk her á oyggjunum.

**Men hvat siga tey ungu**

Tey ungu, sum eru í hasum málbólkinum, fata seg ikki sum vaksin, men tey ynskja og søkja eftir at blíva vaksin, og hetta er eisini partur av teirra menning. Tey ynskja eisini at slíta seg leys av foreldrinum og harvið leysari teymar við heimið. Men tey søkja og ynskja allatíðina nýggjar avbjóðingar. At taka egnar avgerðir er eisini við til at styrkja teirra egna samleika og tey føla enn meira at "eg eri eg". Samstundis læra tey at vera saman við øðrum ungum, sum eftir mínum tykki er tann størsta styrkin.

**Skúlin er fyri øll**

Í álitinum um eftirskúlan i Hvalba verður eisini nevnt, at skúlin er fyri øll. Hetta er eisini hugsanin hja Grundvig um skúlaskap, at skúlin er fyri øll og ikki bara fyri tey, sum eru sera væl fyri bókliga. Hetta er eisini tankin við eftirskúlanum, har allir næningarnir skulu vera nr 1, við øðrum orðum, at øll eru líka góð.

**Tað er umráðandi at hava góðar karmar fyri næmingum við rørslutrupulleikum**

Eftir at hava lisið álitið um eftirskúlan, er eitt ivamál, sum eg haldi má avgreiðast beinanvegin, og tað er, at tað skal ikki gerast munur á, um fólk eru rørslutarnað ella eið. Her skal játtan fylgja við, men tað góða, sum stendur í álitinum er, at eftirskúlin er gjørdur til erndamálið at hýsa brekaðum.

**Ræðumyndin er fólkaminking**

Stór fólkaminking er fyri framman í Føroyum vísa kanningar og framrokningar, so um vit ikki fylgja við, og hava ítøkuligar visónir, serliga innan skúlaskap og í universitetshøpi, verður støðan nógv verri fyri okkara samfelag. Tí tað eru nógv onnur lond sum vit eru í kapping við, um alt tilfeingið, sum skal skapa trivnað og vøkstur. Tilfeingið er eisini eftir minum tykki útbúgvið og skapandi fólk, sum koma at menna landið langt inn í framtíðina. Tí er tað serliga umráðandi at vit byggja eftirskúlan í Hvalba, sum ein íløgu inn í framtíðina. Um vit ikki fylgja við her, ja so er ræðumyndin enn størri við stórari fólkaminking fyri Føroyar og fólkið ferð har ið fólk eru.

**Eftirskúlan í Hvalba beinanvegin**

Vit mugu læra av okkara krepputíð í 90-unum og núverandi vánaligu búskapartíð og vera fyribyrgjandi og hava visónir, tí mugu vit fáa set spakan í beinanvegin fyri eftirskúlanum í Hvalba, hóast núverandi fíggjarstøðu, annars sær ræðumyndin størri út. Landsins myndugleikar, ræðfesti rætt og farið í gongd við at byggja eftirskúlan, tí eitt er vist at eftirskúlin hevur stóra týdning og ávirkan fyri okkara samfelag langt inn í framtíðina.



Tóra við Keldu

## Næmingar ov móðir og lærarar ikki nóg góðir

Um almenna áskoðanin er, at næmingar skulu vera minni í skúla, so teir orka betri í frítíðarskúla, ella/og at lærarar skulu arbeiða minni, tí teir ikki hava nóg góða undirvísing, so er hetta eitt risa afturstig fyri okkum øll.

**Trivnaður og tað fakliga**

Føroyski fólkaskúlin er farin í summarfrí. Góða og ljósa veðrið gevur bæði næmingum og lærarum orku at fyrireika komandi skúláár, og á mangan hátt er júst hendan tíðin avgerandi fyri, hvussu komandi ár fer at ganga.

Eingin ivi er um, at føroyski fólkaskúlin hevur stóran týdning fyri land okkara. Hetta er ein lærustovnur við einum ávísum endamáli. Næmingarnir skulu brynjast til lívið, og tí er fyrireiking og almenn virðing avgerandi.

Skúlin stendur ikki fyri ansing av næmingunum. Tímarnir børn og ung eru í skúla hava eitt mennandi endamál, har trivnaður og tað fakliga eiga at ganga hond í hond.

**Almenna prátið**

Eftir fyrstu PISA royndirnar fingu vit – á mangan hátt – eitt gott og sakligt kjak um føroyska fólkaskúlan. Semja var um, at tað skuldi setast inn, so vit í komandi royndum skuldu standa okkum betri. Nú vit síggja framgongd, lærarar gera eitt gott arbeiði, tykjast tey, ið vara av føroyska fólkaskúlanum at hava fingið maktarloysi.

Vitjaði í morgun heimasíðuna hjá Skúlablaðnum. Har veðrur víst á, at tað er trupult hjá lærarum at veita nóg gott innihald og góða dygd í undirvísingina, tí tímarnir eru ov nógvir. Samstundis verður víst á, at børnini eru ov móð, tá tey koma í frítíðarskúla. Víst verður eisini á, at næmingarnir ganga kanska ov nógv í skúla, og tí skal skúladagatalið endurskoðast. Sum um hetta ikki er nóg mikið. Víðari verður lagt upp til, at skúlarnir nú skulu hava eina viku vetrarfrí. Tí tað fer at spara pening.

Stolti lærarin ristir við høvdinum. Eg siti við bankandi hjarta og lesi. Hvar er almenna virðingin fyri lærarunum og skúlanum? Nú eru lærarar ikki nóg góðir og næmingarnir eru ov móðir. Havi hug at halda, at hetta er láturligt.

**Skúli krevur eina mennandi dagsskrá**

Eitt alment tilboð til børn og ungdóm, sum fólkaskúlin er, gevur onga meining, um stovnurin ikki er ein lærustovnur, sum fær frið og tíð at arbeiða eftir endamálinum. Hava onga grund at halda, at leiðslur og lærarar ikki eru førir fyri at standa fyri hesi tilboði.

Um almenna áskoðanin er, at næmingar skulu vera minni í skúla, so teir orka betri í frítíðarskúla, ella/og at lærarar skulu arbeiða minni, tí teir ikki hava nóg góða undirvísing, so er hetta eitt risa afturstig fyri okkum øll.